§10 “Undantaksloyvi “ kemur afturat og “Kærumøguleikar” verður sostatt §11. Tað sum er skrivað við bláum er nýtt. Einki er slettað.

**§ 10. Undantaksloyvi**

**1) Tá ið umráðandi grundir mæla til tess, ella har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi og tá ið byggifulltrúin hevur viðmælt umsóknini, kann byggimyndugleikin eftir umstøðum og gjøllari settum treytum loyva, at vikið verður frá ásetingunum í hesi byggisamtykt.**

**2) Áðrenn undantaksloyvi verður givið, skal boð sendast grannunum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur, frá tí teir hava fingið boðini. Møguligar viðmerkingar frá grannum eru vegleiðandi.**

**§ 11. Kærumøguleikar**

1. Avgerðir býráðsins ella byggimyndugleikans sambært hesi byggisamtykt kunnu kærast til kærustovn undir Landsstýrinum..

2. Tá annað ikki er fyrisskrivað, er kærufreistin 30 dagar frá tí degi, viðkomandi fekk boð um avgerðina og fekk upplýst kærufreist og -myndugleika. Fyri avgerðir, ið eru alment kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá kunngerðardegi.

3. Kæra um avgerðir, ið byggimyndugleikin hevur givið, frítekur ikki frá at gera eftir fyriskipanini; **tó er kæruvaldinum heimilað at áseta, um kæra skal kunna leingja tíðarfreist í málinum.**

**§ 27: Øki D: Havnarøki**

1) Økið verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey.

2) Byggistigið fyri havnarøkið sum heild má ikki fara upp um 0,3.

3) Rúmmálið á húsinum má ikki, uttan serloyvi frá býráðnum, fara upp um 3 $m^3$ fyri hvønn $m^2$ av grundstykkinum.

4) Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

5) Bygt má ikki vera nærri bryggjutrom enn 10 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.

6) Neystabygging verður ikki loyvd á hesum økinum, og loyvt verður ikki, at verandi neyst verða útbygd. Um eitt neyst verður tikið niður, verður ikki givið loyvið til at byggja uppaftur.

**7) Býráðið hevur heimild til at gera, ella at geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið sum er lagt út til havnarøki á plankortinum.**